**8b í Vágs skúla**

Til Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 7/2010: Uppskot til løgtingslóg um loyvi at nýta solarium**

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um loyvi at nýta solarium**

**§ 1.** Børn og ung mugu ikki nýta solarium, áðrenn tey eru fylt 17 ár.
*Stk. 2.* Sólmiðstøðirnar skulu hava eftirlit við hesum við at krevja samleikaprógv.
*Stk. 3.* Sólmiðstøðirnar skulu fáa gjølla kunning um avleiðingar av at nýta solarium.

**§ 2.** Um ein sólmiðstøð ikki ger sambært § 1, stk. 2 og letur børn og ung, yngri enn 17 ár, taka sól í solarium, verður hetta revsað við bót.
*Stk. 2.* Um brot á hesa lóg fer fram fleiri ferðir, verður sólmiðstøðin stongd.
*Stk. 3.* Um børn og ung, yngri enn 17 ár, verða tikin í at snýta við samleikapróvnum, verða tey revsað.
*Stk. 4.* Sambært stk. 3. verður ein revsaður við sekt. Støddin á sektini verður tillagað eftir brotinum.

**§ 3.** Hendan lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Viðmerkingar**
Endamálið við lógini er at byrgja fyri húðkrabba. Tað er vísindaliga prógvað, at nýtsla av solarium kann elva til húðkrabba. Tí verður neyðugt at gera eina lóg, sum kann hjálpa til við at fyrbyrgja, at ov nógv ung fólk taka sól.

Altjóða granskingardepilin fyri krabbamein IARC hevur nýliga sett solarium á hægsta vandabólk.

Skotland og Frakland hava longu sett forboð fyri solarium fyri ung undir 18 ár. Harumframt hevur Týskland nýliga sett forboð, og í svensku krabbameinsætlanini, ið varð almannakunngjørd í vár, verður mælt til at gera tað sama. Í Skotlandi er t.d. sett krav um, at miðstøðirnar skulu vera mannaðar.

Hevur ein verið í nógvari sól sum barn ella ungur, er ein alt lívið í størri vanda fyri at fáa móðurmerkjakrabba. Sambært serlæknum er eingin ivi um, at sól og solarium hava stóra ávirkan á, um fólk fáa móðurmerkjakrabba. Helvtin av teimum, sum brúka solarium, eru undir 24 ár. Av teimum, sum taka solarium í Føroyum, vitjar fimti hvør solarium eina ferð um vikuna ella meir, sambært Gallup kanning frá 2007.

Kanningar vísa, at vitjar tú solarium eina ella fleiri ferðir mánaðarliga, økist vandin fyri móðurmerkjakrabba tvær til tríggjar ferðir.

Serliga ung fólk eru upptikin av at síggja so væl út sum gjørligt, fylgja rákinum og

vilja ikki vera øðrvísi. Ung fólk halda seg ofta síggja betur og frískari út, tá tey eru sólbrend – eisini um veturin. Eisini vísa kanningar, at nógv ung fólk ikki kenna seg góðtiknan, um tey eru ov hvít. Hetta verður sammet við at vera “nørdur”og “keðiligur”. Tískil velja fleiri ung at taka sól, so tey kunnu vera brún og kul. Við hesum hugburði er sjálvsagt, at tey ungu mangan halda solarium vera ein góðan møguleika. Í teimum heitu londunum, er tað akkurát øvugt, har tað er væl umtókt at vera hvítur. Er hetta tí, at man altíð vil hava tað, man ikki kann fáa?

Aldursmarkið er sett til 17 ár, tí tað verður mett, at tey ungu tá eru nóg búgvin til at taka egna ábyrgd og hugsa seg gjølla um, áðrenn avgerð verður tikin, um man vil útseta kropp sín fyri slíkar strálir.

Krabbameinsfelagið skal leypandi hava kunnandi fundir við sólmiðstøðirnar um vandan og avleiðingar av at nýta solarium.

Lógin hevur ongar beinleiðis útreiðslur fyri landið. Sólmiðstøðirnar kunnu vænta eyka útreiðslur við at hava eitt fólk, ið skal hava eftirlit við aldursmarki, og kunnu somuleiðis rokna við at fáa ein minni umsetning, tá tað kann væntast, at færri fólk fara at taka sól.

**Á Løgtingi, tann 8. februar 2010**

Poul Arni Joensen     Henrik Joensen     Una Nolsø

Bjarta Hergeirsdottir     Sólrun Henrysdottir     Sára S. Debess